# Linda átti sonin á baksetrinum

**Linda Hansen og Poul Nolsøe Sørensen úr Gøtu hava júst fingið tað stórfingnastu gávuna, ið menniskju kunnu fáa. Tann 14. september fingu tey ein fittan son. Linda átti hann í bilinum í Kollafirði**



*Linda Hansen og nýføddi sonurin hava tað bæði gott, hóast hann kom til verðina undir serstøkum umstøðum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

BARNSBURÐUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Mánanáttina 14. september klokkan hálvgum tvey sá ein lítil drongur upp á 52 cm og 3.300 gram fyri fyrstu ferð dagsins ljós. Men hetta hendi ikki á nakrari føðistovu við jarðamóður og sjúkrasystur. Beiggin kom til verðina stutt frá rundkoyringini í Kollafirði. Omman tók í móti, meðan mamman og pápin saman á baksetrinum á bilinum arbeiddu fyri at fáa hann í verðina.

– Alt gekk væl, og vit høvdu tað gott allatíðina, sigur Linda Hansen, sum er komin fullkomuliga fyri seg eftir henda heldur skakandi tilburðin, sum tó gekk væl.

Linda greiðir frá, at hon var ikki sett at eiga fyrr enn 30. september. Hon og drongurin búgva í íbúð í kjallaranum hjá foreldrunum hjá henni í Gøtu. Hetta sunnukvøldið sótu hon og mamma hennara uppi á og prátaðu inntil á leið midnátt. Tá fór Linda niðurundir, tí hon ætlaði sær í song. Hon hevði onki følt tá, men tá hon kom niðurundir, byrjaði tað so spakuliga hjá henni. Hon hugsaði tó ikki stórvegis um tað beinanvegin, tí tað var so langt áðrenn, og hetta var fyrsta barnið. Men tað versnaði skjótt.

Hon skalv illa og spýði nógv. So róptu tey bæði ungu eftir mammuni hjá Lindu, og hon ringdi suður á Landssjúkrahúsið at vita, um tey skuldu koma suður.

– Mamma fekk at vita, at vit skuldu bara taka tað róligt og koyra suður, sigur Linda og tað er ikki sørt, at hon hevur hug at flenna.

Túrin suður minnist Linda ikki so væl, so tað, sum hon sigur, hevur hon fingið frágreitt aftaná.

Hon sigur, at hon minnist, at tey søgdu, at klokkan var fimm minuttir í eitt, tá tey vóru í Skipanesi. Hon lá á baksetrinum og stríddist, meðan mamman sat framman og drongurin koyrdi. Stutt áðrenn Kollafjørð fór vatnið hjá Lindu, og tá ringdu tey og bóðu um, at ein sjúkrabilur koyrdi ímóti teimum.

### Føddi í bilinum

Tá tey komu til Kollafjarðar, helt mamma Lindu, at har var tekin um, at føðingin sjálv var farin í gongd. Hon hoyrdi tað, og tað bar ikki til hjá Lindu at halda aftur, tí pressuverkirnir vóru sterkir tá. Mamman bað so Poul koyra inn til síðuna beint eftir rundkoyringina, og tað gekk ikki long tíð, so var lítli drongurin komin í verðina.

Í regni og vindi á knøunum uttanfyri bilin tók tann nýklakta omman ímóti ommusoninum.

– Vit vóru øll rólig, og tað gekk alt upp á stás, sigur Linda, sum tó heldur skemtandi hevur hug at fílast á umstøðurnar í bilinum.

– Eg hugsaði faktiskt ongantíð um, at eg møguliga fór at eiga í bilinum, so eg minnist, at eg hugsaði, at tað var so ringt at liggja á baksetrinum, tí eg fekk ikki strekt meg og trygdarbeltini lógu undir mær. Og so hugsaði eg, at fyrst skuldi eg liggja so á veg suður og síðani at stríðast á føðistovuni, men so langt kom tað jú ikki, sigur hon flennandi.

So skjótt sum beiggin var komin í verðina, ringdu tey aftur til Landssjúkrahúsið. Sjúkrabilurin var á veg, og tað ráddi einamest um at halda móður og barn heit, inntil hann kom fram, tí bæði høvdu tey tað gott.

Tað gingu tíggju minuttir, til sjúkrabilurin var á staðnum, og Linda var longu tá so birg, at hon gekk við nýfødda soninum úr bilinum til børuna og legði seg á hana. Framvegis við ókliptum nalvastrongi.

– Tá alt var yvirstaðið , og hann var komin í verðina í øllum góðum, tá hevði eg tað beinanvegin fínt, sigur hon glað á málinum.

### Miðdepil

Sum vera man hava Linda, Poul og nýføddi sonurin verið miðdepil í øllum hesa vikuna. Øll hava frætt um tann óvanliga barnsburðin, sum endaði á baksetrinum í einum bili.

– Sjúkrasysturin, sum mamma tosaði við, vildi næstan ikki trúgva tí, at eg hevði átt í bilinum. Tí hetta var jú fyrsta barnið, og mamma var púra rólig allatíðina, sigur Linda.

– Eg haldi ikki, at mamma var bangin. Hon sigur, at hatta var eitt upplivilsi, men næstu ferð kann tað verða, at hon fer at stúra eitt sindur, tá tað nærkast til termin, greiðir Linda frá.

Tað er ikki ofta, at tað gongur so skjótt hjá mammum, sum skulu eiga fyri fyrstu ferð, men tað var gott fyri Lindu, at mamma hennara var so mikið rólig, at hon megnaði sín givna leiklut hesa náttina sum jarðarmóðir til eitt reint UG. Sambandið millum ommu og ommuson verður uttan iva nakað heilt serligt. Linda sjálv letur ikki til at vera stórvegis ávirkað av hesum, men er, sum vera man hjartansfegin um, at alt spældi so væl av. Hon er ikki vorðin bangin av hesum og sigur, at hon fegin vil hava fleiri børn.

Tað fer helst at ganga ein tíð, áðrenn tosið um hesa hendingina fer at leggja seg, men tað leggur Linda onki í.

– Eg skal sjálvandi venja meg við at vera vorðin mamma, men fyrst og fremst skulu vit bara heim til Gøtu at hugna okkum, sigur nýklakta mamman at enda.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Jógvan Johansen 85 ár



Í dag, 18. september, fyllir Jógvan Johansen á Eiði 85 ár.

Jógvan hevur heilt frá ungum av havt góðan hug til sjógvin, og ætlaði sær sum 15 ára gamal at sleppa til skips við sama skipið sum brøður hansara vóru við, men har var ikki pláss fyri honum, so ístaðin fór hann saman við pápa sínum og øðrum eiðismonnum til lands í Íslandi í 1934. Skipið, hann hevði ætlað sær við var Nólsoyggin, ið sum kunnugt ikki spurdist aftur, og hann misti báðar brøður sínar. Men árið eftir fór hann so til skips, og dvaldist á sjónum, stóran part av tíðini sum motorpassari, til hann fyribils legðist upp á land í 1959, tá hann fekk arbeiðið á Loranstøðini á Eiði. Seinast í sekstiárunum tá minkað bleiv um manningina á Loranstøðini, fór Jógvan aftur til skips. Onkrar túrar við fiskiskipum, men meginpartin av tíðini við farmaskipum, eitt nú teimum donsku frystiskipunum, sum sigldu til Amerika við flaki. Seinastu ellivu árini hann var á sjónum, var hann við skipum hjá Traderline. Í 1982 fekk hann starv sum kajfúti á Eiði, og gavst har í 1990, tá hann var blivin 72 ára gamal.

Jógvan giftist Jonny, f. Ellingsgaard (vanliga kallað Nonna), sum eisini var av Eiði, í 1942. Hon doyði í 1991. Tey fingu 5 børn, Ferdinand, sum doyði sum nýføðingur, John, sum býr á Eiði, Odny, sum býr í Havn, Magnus, sum býr á Eiði og Katrin Maria, sum býr í Kvívík.

### Dagurin

**18. september. Titus.** Fleiri halgimenni eru við hesum navni, men her verður helst ikki, sum summir halda, sipað til tann Titus, sum Paulus skrivaði bræv til.

## 25 ára starvsdagur í Føroya Banka

Mánadagin 15. september hevði Berit Wolles Gunnarsson 25 ára starvsdag í Føroya Banka í Havn. Berit byrjaði 15. september 1978 á deildini hjá Sjóvinnubankanum í Hornabø. Bankin bleiv lagdur saman við Føroya Banka í 1994. Berit hevur arbeitt á ymiskum deildum og er í dag í fyrisitini á kredittdeildini hjá bankanum.

Hon er gift við Gunnar H. Gunnarsson, tey búgva í Havn og eiga tvey børn: Egil og Jónu.



*Berit Wolles Gunnarsson við einum málningi hon fekk frá Føroya Banka í sambandi við 25 ára starvsdagin*

## Stjóraskifti hjá P/F Sofus M. Jakobsen

Stjóraskiftið fór fram hjá P/F Sofus M. Jakobsen 1. juni í ár, tá Sofus M. Jakobsen valdi at leggja frá sær og at lata sonin Árna Jakobsen taka yvir. Árni hevur arbeitt í virkinum síðani í 1988.

Virkið, P/F Sofus M. Jakobsen ráðgevandi verkfrøðingar FRI, byrjaði í august 1969. Áðrenn tað hevði Sofus M. Jakobsen arbeitt hjá donskum ráðgevarafeløgum í 8 ár.

Virkisøkið hjá P/F Sofus M. Jakobsen er ráðgeving, projektering, byggi- og projekteringsleiðsla. Í seinastuni hava eisini uppgávur verið innan umhvørvis- og tilbúgvingarætlanir.

Projekteringsarbeiði umfatar ventilatión og HVS innleggingar, sprinklaraskipanir, køvigassskipanir, køliverk, neyðstreymsverk, CTS-skipanir, vatnveitingar, kloakkskipanir og fjarhitaskipanir.

Síðani virkið byrjaði, hevur tað verið við í fleiri enn 500 smærri og størri verkætlanum, har nakrar av størri verkætlanunum eru vatnverkið í Villingadali, fjarhitaskipanin í Havn, útbyggingin á Landssjúkrahúsinum og nú bygningurin hjá Føroya Tele í Hoyvík.

Tá flest fólk vóru á teknistovuni í 1989, vóru tey 13 í tali, bæði verkfrøðingar og tekniskir hjálparar. Í dag eru 8 verkfrøðingar í starvi.

Umframt at hava verið stjóri hevur Sofus eisini sitið í stýrinum hjá FRI í tvey skeið. FRI er felagið hjá ráðgevandi verkfrøðingum í Danmark.

Virkið roynir at vera við innan nýggjastu tøkni og í menningini av nýggjastu samstarvsformum.

Í sambandi við stjóraskiftið verður bjóðað til móttøku á teknistovuni hjá P/F Sofus M. Jakobsen, J.H. Schrøtersgøta 22, fríggjadagin 26. september frá kl 15-17.




*Sofur M. Jacobsen leggur nú frá sær sum stjóri hjá P/F Sofus M. Jakobsen, og sonurin, Árni Jakobsen, tekur yvir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*